UTTAN ÚR HEIMI

## Lýtt og vátt í januar

Bæði í Danmark og Noregi eru fólk á einum máli um,. at januarveðrið hevur ikki verið, sum tað plagar at vera.

Í Danmark hava tey sett nýtt hitamet. að hendi fyrradagin, tá ein veðurstøð í Sønderborg máldi 12,4 hitastig, og so lýtt hevur tað ikki verið í Danmark hesa ársins tíð, síðani farið varð undir at máta hitan, sigur danska veðurstovan. Samstundis vísa danskir fulgafrøðingar á, at fulgar, sum fyrr plagdu at vera sunnan fyri um veturin, eru nú í Danmark alt árið.

Í Noregi hevur januar eisini verið sjáldsama lýggjur. Á veðurstovuni siga tey, at meðalhitin tíggju teir fyrstu dagarnar í ár var sum miðskeiðis í apríl onnur ár. Á Avalbard hevur tað verið uppaftur lýggjari. Har hevur hitin verið sum í mei mánað undanfarin ár. Í Noregi læra fólk seg um, at tað hevur verið nógv meiri vindur í ár, enn vanligt hevur verið, og harafturat hevur tað eisini regnað nógv verri enn fyrr.

## Byggja færri skip

Sjálvt um norsk farmaskipareiðaríir bíløgdu nógv nýggj skip í fjør, vóru bíleggingarnar lutfalsliga fáar samanborið við, hvussu stóran part av heimsflotanum norðmenn eiga.

Sambært Aftenposten bíløgdu norsk reiðaríir 90 nýbygningar upp á tilsamans 2,4 milliónir tons í 2004. Byggikostnaðurin er ímillum 19 og 20 milliardir norskar krónur. Sambært blaðnum eiga norðmenn fimm prosent av heimsflotanum, men tær norsku bíleggingarnar svara bara til trý prosent av øllum bíløgdum nýbygningum í fjør.

Herbert Kristoffersen hjá reiðarafelagnum sigur við Aftenposten, at tað eru tey óvissu viðurskiftini í Noregi, sum gera, at reiðaríini aftra seg við at bíleggja fleiri skip. Eitt nú hava politikararnir lyndi til at broyta skattareglurnar alt ov ofta, sigur hann. Men Herbert Kristoffersen sigur seg eisini hava varhugan av, at yvirhøvur er byggihugurin ikki so stórur, sum hann hevur verið.

## Persson fyri skotum

Í Svøríki samdust teir politisku flokkarnir um at binda frið aftan á flóðaldluna í Suðurasia, sum eftir øllum at døma hevur kostað fleiri hundrað svium lívið, men nú er friðurin úti.

Nú leggur andstøðan eftir stjórnini. Sagt verður, at stjórnin var alt ov sein at taka neyðug stig, tá tíðindini um flóðalduna frættust. Summir andstøðupolitikarar vilja vera við, at Gøran Persson, forsætisráðharri, og Laila Freivalds, uttanríkisráðharri, drálaðu ov leingi við at seta bjargingararbeiðið í verk. Eitt nú verður víst á, at partar av svensku tilbúgvingini vóru til reiðar at hjálpa longu stutt eftir sjálva flóðalduna, men at tey noyddust at bíða eftir neyðugum loyvi frá stjórnini.

- Gøran Persson vil sleppa at ráða, men hann vil ikki hava ábyrgdina. Hann hevur einki ímóti at standa á brúnni, tá tað gongur væl, men ikki tá mótvindur er, sigur formaðurin hjá kristiligu demokratnunm, Gøran Hægglund.

## Ongan hita í kulda

Illveður í norðasta partinum av amerkanska statinum Alaska hevur havt við sær, at ein bygd hevur mist bæði streymin og hitan. Samstundis hevur illveðrið elvt til ógvusligan kulda har á leiðini, og í gjár frysti 30 stig. Tann nógvi vindurin gjørdi, at tað kendist sum heili 56 kuldastig, sigur CNN.

Heilsumyndugleikarnir hava ávarað um, at tann nógvi kuldin kann vera vandamikil fyri tey umleið 300 fólkini í bygdini Kaltovik, men myndugleikarnir siga, at teir fáa einki gjørt, fyrr enn veðrið er batnað. Tað eru fleiri hundrað kilometrar til næsta bý, sum eitur Barrow, og fleiri royndir at sleppa til Kaltovik við tyrlu eru miseydnaðar, tí vindurin hevur verið ov nógvur.

Borgarstjórin í Kaltovik hevur sagt, at batnar veðrið ikki, fer at at lýsa bygina í undantaksstøðu, tí tann nógvi kuldin hevur gjørt, at vatnveitingin er fryst, og skilið er tað sama í kloakkunum, sigur hann.

# Vandamest at búgva í Tokyo

**Vandin fyri, at ein náttúruvanlukka skal raka ein av heimsins størstu býum, er størstur í Tokyo, Los Angeles og San Fransisco**

VANLUKKUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Myndugleikarnir í stórbýum sum Tokyo, Los Angeles og San Fransisco eiga at gera eina neyvan tilbúgvingarætlan sum skjótast, so fólk fáa greit at vita, hvat tey skulu gera, verður bý urin fyri einari náttúruvanlukku.

Tað sigur heimsins største tryggingarfelag, Munich Re, í einari nýggjari frágreiðing. Har stendur at lesa, at vandin er størstur í Tokyo, tí vandi er fyri, at býurin kann verða raktur av bæði jarðskjálvta, gosi, tropiskum ódnnum, tsunami-flóðaldum og vatnflóð. Sambært Munich Re er vandin næstan fýra ferðir størri í Tokyo enn í San Fransisco og sjey ferðir størri enn í Los Angeles.

Tann nýggja frágreiðingin verður løgd fyri ein ST-fund í Kobe í Japan seinni í mánaðinum. Í 1995 var ein harður jarðskjálvti í Kobe. Hann kostaði 6.000 mannalív og gjørdi skaða fyri meiri enn 100 milliardir dollarar.

Munich Re sigur, at ein tílík vanlukka fer at krevja munandi fleiri mannalív, rakar hon ein av hinum stórbýunum. Í Tokyo búgva 35 milliónir fólk og í Los Angeles 9,9 milliónir.

# Tekur 555 ferðafólk



*Risaflogfarið Airbus 380 uttan fyri verksmiðjuna í Tolouse týsdagin. Næsta ár verður tað sett í rutuflúgving*

*Mynd: Reuters*

**Gongst eftir ætlan, fer heimsins størsta ferðamannaflogfar í rutuflúigving um eitt ár**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Týsdagin í næstu viku eru umleið 5.000 fólk boðin til franska býin Tolouse at hyggja at nýggja risaflogfarinum hjá Airbus-verksmiðjuni.

Airbus 380 er í tveimum hæddum og hevur pláss fyri 555 ferðafólkum. Flogfarið hevur helvtina størri gólvvídd enn jumbojetflogfarið hjá amerikonsku verksmiðjuni Boeing, sum í løtuni er heimsins størsta ferðamannaflogfar, og tað tekur 39 prosent fleiri ferðafólk.

Enn hevur Airbus 380 ikki verið í luftini, og tær fyrstu royndarflúgvingarnar verða ikki fyrr enn í heyst. Kortini er áhugin stórur, og fleiri flogfeløg hava longu bílagt nøkur av teimum nýggju risaflogførunum. Eitt nú hevur avstralska ferlagið Qantas bílagt 12 Airbus 380.

Í USA er Boeing í øðini um, at Airbus-verksmiðjan fær stóran stuðul frá ES, men svarið úr Bruxelles er, at Boeing fær eisini stóran stuðul úr amerikanska ríkiskassanum.

## Ikki øll sleppa á val

**Irakski forsætisráðharrin ásannar nú, at tað ber ikki til at halda val í øllum landinum.**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tann 30. januar verður tjóðartingsval í Irak, men allir irakar sleppa ikki á val.

Stjórnin í Bagdad hevur higartil hildið uppá, at ófriðurin skuldi ikki ávirka valið, men í gjár segði Iyad Allawi, forsætisráðharri, at tað ber ikki til at halda val í teimum ófriðarligastu økjunum.

Fyrradagin doyðu 25 fólk í tveimum bumbuatsóknum í Irak, og mótstøðumenn hava hótt við at herða ófriðin, so hvørt sum valdagurin nærkast. Endamálið er at ræða fólk frá at fara á val.